# Hósdagur 27. januar

## ÚF

7.00 **Tíðindi**
7.03 **Morgunlestur** - Hans Jacob Sigvardsen á Argjum lesur
7.15 **Barnaløtan** - Jonna og Katrin leggja til rættis
7.30 **Tíðindi**
7.35 **Góðan Morgun Føroyar**
8.00 **Tíðindi**
8.05 **Góðan Morgun Føroyar**
9.00 **Tíðindi**
9.05 **Morgunlestur** (e)
9.15 **Dagsins tónar**
9.30 **Fyri hundrað árum síðani**(e)
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Fimleikaløtan** - Elna og Egga skipa fyri
10.10 **Lurtararnir og vit** - Elis Poulsen stílar fyri
11.00 **Tíðindi**
11.01 **Úr líðum og fjøllum**(e) 7. partur.
11.30 **Undir døgurða**
12.00 **Veðurtíðindi**
12.02 **Middagstónleikur**
12.15 **Skráin og lýsingar**
12.20 **Tíðindini**
12.40 **Døgurðatónar**
13.00 **Tónatímin**
14.00 **Tíðindi**
14.01 **Fimmarin** (e)
15.00 **Tíðindi**
15.01 **Nýtt og gott gamalt** - Høgni Zachariasen velur løgini
16.00 **Tíðindi**
16.01 **Rokkstovan** - Rasmus Rasmussen stílar fyri
17.00 **Tíðindi**
17.05 **Geykn** - Jóhannes Miðskarð og Maria Abrahamsen stíla fyri
18.00 **Barnaløtan** (e)
18.25 **Skráin og lýsingar**
18.30 **Tíðindini**
19.00 **Í grannalagnum** - Suni Merkistein stílar fyri
19.30 **Harmonikutónar** - Flóvin Jacobsen stílar fyri
20.30 **Tornið á heimsins enda** - 8. partur av skaldsøgu eftir William Heinesen. Hans Thomsen týddi og las
21.00 **Tíðindi**
21.05 **Vaglið**- Ginna Midjord og Bjarni Mohr leggja til rættis
23.00 **Tíðindi**

## Rás 2

7.30 **Góðan morgun!** Dagurin í dag
8.00 **Lættur tónleikur**
9.45 **Orðið**- Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 **Kaffi** - Morgunsending við ymsum úr bløðunum, veðurlagnum, koyrilíkindum, matarskránni o.ø. - Sonne Smith leggur til rættis
11.03 **Tónleikur**
12.00 **Tíðindi**
12.15 **Middagstónleikur**
13.00 **Norðurlendskur dansitónleikur**
14.00 **Tónleikur**
15.00 **Tíðindi**
15.15 **Blandaður tónleikur**
16.00 **Seinnapartur** - Løtt innsløg. Smátíðindi. **Tónleikur**.
17.00 **Barnasending** - Ein søga um sangin »Eg eri Jesusar lítla lamb«, 2. partur - Anja Hansen leggur til rættis
17.30 **Non Stop Country**
18.00 **Tíðindi**
18.15 **Náttúrðatónleikur**
19.00 **Stuttsøga** - Sonne Smith lesur
20.00 **Sláttur** (fyrri partur) - Gott nýtt og gamalt, hugnasending við við ymsum innsløgum fyri tilkomin. - Martin Sømark leggur til rættis
21.00 **Tíðindi**
21.15 **Sláttur** (annar partur)
22.00 **Jukebox** - Lurtarin velur løgini
23.00 **Love Songs**
0.00 **Orðið**
0.15 **Náttartónar** - Hon spælir alla náttina

## SvF

18.30 **Øskufía** 4:26
19.00 **Krosskast** (e)
20.00 **Dagur og Vika við Grannum okkara**
20.50 **20. øld** 1:12 - ensk dokumentarrøð
21.45 **Krimitímin: Kellingsbokslið**2:3 - ensk krimirøð
22.35 **Ferðafrásøgn: Matur úr øllum heiminum**
23.25 **South Park 10** - am. kult-teknirøð
23.45 **Liðugt**

## 3

5.00 **Børne-hjørnet med Disney**
7.15 **TV-shop**
8.10 **Hvide Løgne**
8.35 **Alle tiders barnepige**
9.05 **Ricki Lake**
10.00 **Hun så et mord**
10.55 **Horton-sagaen**
11.45 **Horton-sagaen**
12.35 **Drew Carey**
13.05 **Sjov og Spas**
13.30 **Panter-tanter**
14.00 **Det lille hus på prærien**
14.55 **Interne affærer**
15.50 **Sjov og Spas**
16.20 **Ricki Lake**
17.15 **Dagens Nyheder på TV3**
17.30 **Alle tiders barnepige**
18.00 **Sabrina - skolens heks**
18.30 **Hvide Løgne**
19.00 **Efterlyst Special**
19.30 **På flugt**
21.15 **SexOrama**
21.45 **Alle tiders barnepige**
22.15 **Dagens Nyheder på TV3**
22.25 **Drew Carey**
22.55 **Skadestuen**
23.50 **Monty Pythons flyvende cirkus**
0.25 **I lyst og nød**
0.55 **Ellen**
1.25 **Caroline, karrieren og kærligheden**
1.55 **Hvide Løgne**
2.25 **Godnat**

## Eurosport

7.30 **Sailing**
8.00 **Tennis** - live
10.30 **Tennis**
18.00 **Olympic Games**
18.30 **Football** - live
20.30 **Boxing**
22.00 **Tennis**
23.00 **Rally**
0.00 **Olympic Games**
0.30 **Close**

## BBC World

0.00 **World News – Weather**
0.30 **HARDtalk**
1.00 **News – Weather**
1.30 **Holiday**
2.00 **News – Weather**
2.30 **The Money Programme**
3.00 **News – Weather**
3.30 **Asia Today**
3.45 **World Business Report**
4.00 **News – Weather**
4.30 **HARDtalk**
5.00 **News – Weather**
5.30 **Top Gear**
6.00 **World News – Weather**
6.30 **Europe Direct**
7.00 **World News – Weather**
7.30 **HARDtalk**
8.00 **World News – Weather**
8.30 **The Money Programme**
9.00 **World News – Weather**
9.30 **HARDtalk**
10.00 **World News – Weather**
10.30 **Holiday**
11.00 **The World Today**
12.30 **The Money Programme**
13.00 **World News**
13.15 **World Business Report – Weather**
13.30 **The World Today**
14.30 **Top Gear**
15.00 **World News – Weather**
15.30 **HARDtalk**
16.00 **World News – Weather**
16.30 **The Money Programme**
17.00 **World News**
17.15 **World Business Report – Weather**
17.30 **Talking Movies**
18.00 **World News – Weather**
18.35 **World Business Report**
18.45 **World Sport**
19.00 **World News – Weather**
19.30 **HARDtalk**
20.00 **World News – Weather**
20.30 **Panorama**
21.00 **World News**
21.10 **World Business Report – Weather**
21.30 **Earth Report**
22.00 **World News**
22.30 **Europe Direct**
23.00 **World News – Weather**
23.30 **World Business Report**
23.45 **Asia Today**

## BBC Prime

0.00 **TLZ: »Wheeler on America«**
1.00 **TLZ: »Come outside: »Boots«**
1.15 **TLZ: »Come outside: »Spiders«**
1.30 **TLZ: »Come outside: »Buses«**
1.45 **TLZ: »Come outside: »Apples«**
2.00 **TLZ: »The Copulation Explosion«**
2.30 **TLZ: »Rothko – The Seagram Murals«**
3.00 **TLZ: »Hidden Visions«**
3.30 **TLZ: »Lifelines«**
4.00 **TLZ: »Suenos World Spanish«**
4.15 **TLZ: »Suenos World Spanish«**
4.30 **TLZ: »Suenos World Spanish«**
4.45 **TLZ: »Suenos World Spanish«**
5.00 **TLZ: »Computing for the less Terrified – Communication«**
5.30 **TLZ: »Look ahead«**
6.00 **Dear Mr. Barker**
6.15 **Playdays: »Playground Stop«**
6.35 **Get your own back**
7.00 **The Biz**
7.30 **Going for a Song**
7.55 **Style Challenge: »David Essex Fans«**
8.20 **Change that: »Devizes«**
8.45 **Kilroy: »Put My Parent In Home«**
9.30 **EastEnders**
10.00 **Antiques Roadshow**
11.00 **TLZ: »Rosemary Conley«**
11.30 **Ready, Steady, Cook**
12.00 **Going for a Song**
12.25 **Change that: »Devizes«**
13.00 **Style Challenge: »David Essex Fans«**
13.30 **EastEnders**
14.00 **Ground Force: »Bromley«**
14.30 **Ready, Steady, Cook**
15.00 **Dear Mr. Barker**
15.15 **Playdays: »Playground Stop«**
15.35 **Get your own back**
16.00 **Classic Top of the Pops**
16.30 **Three up, Two down: »**
17.00 **Waiting for God**
17.30 **The Antiques Show**
18.00 **EastEnders**
18.30 **Vets in Practice: »Birthdays«**
19.00 **Last of the Summer Wine: »Leaving Home«**
19.30 **Only Fools and Horses: »Homesick«**
20.00 **Casualty: »Benny and the Vets«**
21.00 **Shooting Stars**
21.30 **Comedy Nation**
22.00 **Nervous Energy**

***ÚF – Hósdagur kl. 17.05:***

## Geykn

Tíðin nærkast til at freistin er úti til at avgera, hvørja miðnámsútbúgving ein skal søkja inn á næsta skúlaár. Í sendingum, sum koma, verður hugt at miðsnámsútbúgvingum og hvørjir aðrir møguleikar eru fyri útbúgving. Í hesum sambandi kanst tú skriva til okkara, um tú hevur onkran spurning. Í hvørjari sending verða innkomnir spurningar svaraðir.

***SvF – Hósdagur kl. 20.50:***

## 20. øld

### 1:12 Tað ókenda

Ensk dokumentarrøð tólv pørtum.

Ómettaða forvitni menniskjans hevur fingið okkum til at leita eftir størri og størri avbjóðingum. Farið verður út um mørk og sigrast skal á fjøllum. Alt hetta fyri at royna okkara styrki, áhaldni og uppfinnsemi.

Í fyrsta parti hoyra vit um hetjurnar, ið hava sett lívið í vága fyri at fara út um øll mørk og kanna tað ókenda. Rannsóknarfararar, fjallaklintrarar, rúmdarfararar og onnur.

***TV3 – Hósdagin kl. 14.55:***

## Interne Affærer

Amerikonsk sendirøð

Harmon Rabb verður settur at taka sær av einum torførum máli, tá hann skal vera verji hjá sjóløjtlantinum, Elizabeth Lane, sum er ákærd fyri at hava skotið og dripið ein turkiskan diplomat. Harm finnur út av, at Elizabeth ikki fær hjálpt serliga nógv, við tað at hon einki minnist um hendingina, og tískil noyðist hann at kanna málið sjálvur.

Hann finnur tó skjótt út av, at tað er meira í hesum máli, nevnliga njósning av ringasta slag.



***TV3 – Hósdagin kl. 19.00:***

## Efterlyst Special



Morðið á Alice Kansiime, sum fór fram í Ringsted í 1997, er eitt hitt óhugnaligasta í danskari søgu. Fyri fyrstu ferð greiður løgreglan nú frá, hvat tey roknað við er hent teir seinastu minuttirnar av lívinum hjá 37 ára gomlu kvinnuni.

Skøkjan, sum var úr Uganda, varð myrd við einum ókendum vápni, eftir at hon var stungin við knívi fleiri ferðir. Eftir hetta, fleygaði drápsmaðurin sær uppi yvir líkinum, áðrenn hann skar hondina av kvinnuni.

Talan er um somikið óvanligar umstøður, at løgreglan enn ikki veit, hvat ætlanin hjá drápsmanninum hevur verið við hesum.

***TV3 – Hósdagin kl. 19.30:***

## På flugt

Amerikanskur spenningsfilmur frá 1994

Sarah Blake verður fullkomuliga ørkymlað, tá hon finnur út av, at maður hennara, Sam Blake, er óreiðiligur og samstarvar við mafiuna. Fyri at fáa hana at tiga, hevur Sam keypt ein leigudrápsmann, sum skal gera av við hana.

Við hjálp frá FBI megnar hon tó at sleppa undan hesum, men tá Sarag verður forelskað í politistinum, Kevin Nicholas, sum er settur at ansa eftir henni, gerst alt meira vandamikið.

***TV3 – Hósdagin kl. 21.15:***

## SexOrama

Hvussu fær ein sex, tá ein er einsamallur? SexOrama roynir at vinna erotisk ævintýr í náttarlívinum í Keypmannahavn saman við teimum báðu einsamøllu, tekkiligu gentunum, Linea og Hele, samstundis sum einsamalli Orla roynir at skora sær okkurt heima í Århuus. Tó eru ikki øll, sum tora at fara í býin at leita, tí tey, sum selja telefonsex, hava góðar dagar. Fyri 200 kr. kanst tú keypa sex í einar 10 minuttir. SexOrama lurtar við, tá 24 ára gamla Gitte ger linjuna rættuliga heita. Spurningurin er tó, hvussu man kann fáa tað gott við einum »one-night stand«, og hvussu er við kærleikanum, tá man hvørt vikuskifti er saman við einum nýggjum seingjarfelaga. SexOrama hyggur nærri eftir gleði og sorg á seingjarstokkinum.







# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Umrøða av ítróttinum um vikuskiftið er í blaðnum í morgin**

# Undirhald í serflokki á Hálsi

*13 útvísingar, harav tríggjar góvu reytt kort, fimm misnýtt brotskøst, málmansspæl í serflokki og síðst, men ikki minst, ein javnan og spennandi dyst. Jú, áskoðararnir uppi á Hálsi fingu sannuliga sítt, tá seinasta útgávan klassikaranum yvir øllum í føroyskum hondbólti varð leiktur mikukvøldið*



*Ingi Olsen varð millum estu leikararnar á vøllinum, so leingi sum dómaraparið gav honum loyvi til tess…*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

JÁKUP MØRK

Kyndil-VÍF 19-20 (11-11)

Eftir at Kyndil seinastu vikuna hevði fingið tvey avbera góð úrslit, móti føroyameistarunum av Strondum og oddafiskunum úr Vestmanna, var tað við góðum treystið, at viðhaldsfólk teirra leitaðu sær í høllina mikukvøldið.

Kyndilsleikararnir høvdu eisini tørv á allari hjálp, sum teir kundu fáa frá áskoðarafjøldini, tí ikki nóg mikið við at VÍF var mótstøðuliðið. Talan var nevnliga samstundis um ein sannan lagnudyst, við tað at Kyndil við einum tapi var so at siga afturúrsiglt í FM-stríðnum. Hinvegin kundu teir við einum sigri gera sítt til, at spenningurin í toppinum gjørdist so stórur sum sjáldan sæð.

### Stórur missur

At byrja við var eisini líkt, at kyndilsleikararnir tóktust eitt sindur darvaðir av stóru uppgávuni, og áðrenn teir rættuliga høvdu fingið beinini á vøllin, høvdu vestmenningarnir loyst frá posabandinum.

Trý máls leiðslan, sum VÍF vann sær fyrstu løtuna vardi tó ikki so leingi, tí fáar minuttir eftir, hevði Kyndil longu togað seg fram um gula herin. Kyndil tóktist nú at vera komið rættuliga inn í dystin, og ikki minst frálík avrik frá Lars Winther í málinum og Una Wardum, sum skermaði av fyri Sámali, syrgdu fyri, at Kyndil rættuliga fekk tak á mótstøðuliðnum.

Tað var tó ein dyggur smeitur fyri Kyndil, at Hans Áki fekk sína næstu útvísing eftir einans 15 minuttir, við tað at hann eftir hetta bert varð nýttur í álopspartinum, tí ein triðja útvísing hevði borið reytt kort við sær, umframt leikbann til seinnu hálvfinaluna móti VÍF. Hetta seinna, tí Hans Áki longu tvær ferðir í ár hevur fingið reyða kortið, orsakað av trimum útvísingum.

### Leikaði javnt á

Restina av hálvleikinum leikaði sera javnt á, og liðini bæði skiftust um at hava leiðsluna, til tey á hálva tímanum samdust um at fara í skiftirúmið við eins nógvum málum.

Seinasta sekundið av fyrra hálvleiki varð Ingi Olsen útvístur, og teir báðar fyrstu minuttirnar av seinna hálvleiki nýttu havnarmenninir til at vinna sær eina tvey máls leiðslu. VÍF megnaði tó eisini at svara hesum aftur, hóast teir ikki fingu so nógv burtur úr, tá Kyndil í nærum tveir minuttir leikti við tveimum leikarum í undirtali.

Til seinni hálvleikur var hálvrunnin fylgdust liðini nú aftur, men tá setti Eli Müller sær brádliga fyri, at nú var nóg mikið.

### Eli stongdi

Í samfullar 12 minuttir stongdi hann nú fyri málinum, og líka mikið hvussu kyndilsleikararnir royndu, so fingu teir ikki bóltin í málið. Jacob royndi seg nakrar ferðir, og eisini vóru Leivur, Hans Áki og Regin leysir, uttan at nakað spurdist burturúr, og fyri at krydda avrikið enn meira, so bjargaði hann eisini tveimum brotskøstum hesa løtuna.

Í hinum endanum fingu liðfelagarnir nøkur mál burtur úr hesa løtuna, og hóast áskoðarnir gjørdust heldur bangnir, tá Ingi brádliga fekk reyða kortið, so sá hetta ikki út til at gera nakran mun.

Tá fýra minuttir vóru eftir, var støðan sostatt 20-17 til vestmenningar, og nú tóktist sigurin vísur. Brádliga fekk Lars tó sama hugskot, sum starvsfelagin í hinum endanum, og nú fingu vestmenningar ikki fleiri mál.

Tveir minuttir fyri leiklok, var nú bert tað eina málið á muni, og hóast áskoðarar og leikarar royndu at gera sitt, so megnaði hvørki av liðunum at fáa fleiri mál, og kundu vestmenningar tí fegnast um sigurin, tá seinasta bríkstli loksins ljóðaði.

Seinasta løtan av dystinum gjørdist sostatt rættuliga spennandi, og dramatikkurin gjørdist ikki minni av, at tað tvær ferðir varð neyðugt hjá dómarunum at fara í reyvalumman eftir ostaskorpuni. Fyrru ferðina, tá Uni fekk sína triðju útvísing fyri ov hart verjuspæl, og seinnu ferðina tá yngri bróðurin, Bjarni, í seinastu sekundunum legði fót fyri mótstøðuleikara.

Hóast tað sjálvsagt altíð er keðiligt at verða rikin av vølli, so man hetta í hesum førinum kennast serliga svárt hjá Bjarna. Gerðin var bæði óneyðug og tápulig, og harumframt noyðist hann nú at hyggja at, tá liðfelagirnir um eina viku skulu royna seg_móti VÍF.

### Góð dómaraavrik

At enda skal viðmerkjast, at seinast eg sá teir báðar, Kára og Dánjal døma ein oddadyst, var døming teirra alt annað enn góð eftir mínum tykki.

Mikudagin var rættuliga viðvent í holuni, tí hóast tað mangan stóð nógv á bæði leikarum og áskoðarum, so megnaðu teir alla tíðina at halda høvdið kalt, soleiðis at teir uttan stórvegis hóvasták leiddu dystinum í samfullar 60 minuttir.

Hesu ferðina verður tað so til eitt herðaklapp, og verður hatta støðið framyvir, eru helst fleiri í væntu.

### Dysturin í tølum:

**Málskjúttar:**
Kyndil: Jacob Jónsson 6 (1), Bjarni Wardum 5 (2), Uni Wardum 2, Hans Á. D. Christiansen 2 (2), Rúni Poulsen 1, Regin Petersen 1, Leivur Holm 1, Janus E. Sørensen 1
VÍF: Sámal Joensen 7 (2), Ingi Olsen 6, Agnar Joensen 3, Petur Fr. Joensen 2, Sjúrður Holm 1, Martin Hummeland 1
**Brotskøst:**
Kyndil 7, VÍF 5
**Útvísingar:**
Kyndil 6, VÍF 4
**Diskvalifikatiónir:**
Kyndil 2 (eitt beinleiðis reytt og eitt 3x2 minuttir), VÍF 1 (beinleiðis reytt)
**Dómarar út Tjaldur:**
Kári Hansen og Dánjal Hansen



*Men eftir at liðskiparin varð rikin av vøllinum, hildu Agnar og hinir liðfelagirnar fram, so sigurin varð fingin til høldar*

***Mynd: Álvur Haraldsen***